VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av suðri og regn. Seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av landsynningi, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av suðri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 14 og 17 stig.



Veðrið leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.

Veðrið sunnudagin og mánadagin:
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 18 stig.

DAGSINS FERÐAFÓLK

»Árni Nicolajsen, 58 sumrar, Havnarmaður«

Orð: Rókur Jakobsen
rokur@sosialurin.fo

■ Hvat tekst tú við dagliga?

– Eg eri arbeiðstøkur fiskifrøðingur. Tað havi eg verið síðan september í 2004. Nú eri eg farin at takast við film. Í januar í ár fór eg á háskúla í Odder, har tey hava byrjað eina grein í film/ og sjónvarpsframleiðslu grein. Her var eg í 20 vikur.

■ Hevur tú altíð havt áhuga fyri filmi?

– Ja, øll hyggja jú eftir filmum. Man kann siga, at tað er ein gamal dreymur, at sleppa at gera film. Men fyrr var tað so torført at sleppa framat. Men nú er alt vorði digitalt, og hetta merkir at miðilin er meiri atkomuligur. Við tí nýggju tøknini er tað vorðið lættari at fáast við film. Ikki sum fyrr í tíðini, tá ið ein mátti sita og klippa hesar filmrullirnar. Nú leggur tú alt inn í eina teldu, og har inni kannst tú klippa og redigerað alt.

■ Hvat slag av fimli hevur tín áhuga?

– Bæði spælifilmar og dokumentarfilmar. Tað ræður um at finna sína egnu styrki. Eg haldi, at tað hevði verið, spennandi at tikist við bæði sløgini. Í Føroyum eru nógvar góðar søgur, sum kundi verið filmatiseraðar. Eitt nú haldi eg, at Lognbrá og Fastatøkur (Heðin Brú, blðm.) eru góðar søgur, sum siga nakað um føroyska samleikan. Hetta eru dømir um søgur, sum eg hevði vilja umgjørt til film. Men annars haldi eg at tað hevði verið stuttligt at gjørt okkurt føroyskt sum líkist "Matador" ella "Krøniken", sum vit kenna niðri frá

■ Hvussu við lívfrøðini?

– Hon hevur enn mín áhuga. Eg hevði væl tímað at gjørt ein film um menningarlæruna. Tað skuldi so verið ein dokumentarfilmur.

■ Hvat er næst á skránni hjá Árna Nicolajsen?

– Eg havi søkt inn á Medieskolerne í Viborg. Vónandi sleppi eg inn har, men vit fáa at síggja.

■ Hvørjum vil tú senda eina heilsu?

– Eg vil gjarna senda eina heilsu til verfaðir mín, Jacob V. Hansen. Hann fylti 100 í gjár.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	8
Qaqortoq	9
Ammassalik	6
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	8
Tórshavn	10
Lerwick	10
Aberdeen	13
London	23
Tromsø	--
Bergen	12
Oslo	--
Stokkhólm	21
Keypmannah.	24
Helsinki	20
Moskva	18
Berlin	30
Warzawa	26
Kiev	23
Bukarest	29
Paris	17
Madrid	26
Róm	28
Malorca	27
Athen	31
Malta	34
Tunis	39
Beijing	32
New Dehli	34
Bangkok	32
Jakarta	30
Sydney	14
New York	23
Miami	26
Los Angeles	20
Meksikobýur	21
Panama	30
La Paz	11
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	10

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt hátrýst, 1022 hPa. við Ermasund fer spakuliga eystureftir og mennist. Eitt lágtrýst, 999 hPa. í útsynning úr Íslandi stendur í stað og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósnáttina.



Í dag:
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani til havið eystan fyri Føroyar stendur eisini í stað.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 27/6 kl. 06^{00}– 28/6. 06^{00}. Hitin í gjár: 10,3°
Minsti hiti máldur í juni: -0,3° - Mesti hiti máldur í mai: 20,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,5 mm – mált frá 27/6 kl. 06^{00}– 28/6 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í juni: 51,8 mm

VESTFALLSKYRRINDI

16. juni	Mánin næstur jørðini
25. juni	Tendring
1. juli	Mánin longst frá jørðini
3. juli	Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/ Vágafirði		Skúvoyar-/ Skopunarfirði		Hestfirði/ Sundalagnum		Vestmanna-sundi		Mykines-firði		Nólsoyar-firði		2 fj. í LS úr Mjóvanesi		Leirvíksfirði/ Haraldssundi		Kalsoyar-/ Svínoyarfirði		Hvanna-sundi		Fugloyar-firði	
	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.
28. juni	09.46	22.10	08.46	21.10	09.01	21.25	11.46	-	00.23	12.46	08.01	20.25	07.01	19.25	10.01	22.25	11.01	23.25	09.31	21.55	10.46	23.10
29. juni	10.31	22.53	09.31	21.53	09.46	22.08	00.10	12.31	01.10	13.31	08.46	21.08	07.46	20.08	10.46	23.08	11.46	-	10.16	22.38	11.31	-
30. juni	11.13	23.33	10.13	22.33	10.28	22.48	00.53	13.13	01.53	14.13	09.28	21.48	08.28	20.48	11.28	23.48	00.08	12.28	10.58	23.18	00.53	12.13
1. juli	11.52	-	10.52	23.11	11.07	23.26	01.33	13.52	02.33	14.52	10.07	22.26	09.07	21.26	-	12.07	00.48	13.07	11.37	23.56	00.33	12.52

Sosialurin

Lesið Sosialin

5 707265 100043 >